# Nøvn



## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi á ymsan hátt, tá ið okkara høgt elskaði sonur, bróðir, mamubeiggi og babba

**Bjørn Bjarnason Andreassen**
**Norðskála**
**01.12.89 – 13.10.10**

brádliga varð tikin frá okkum.

Takk, Símun Jacobsen prestur, fyri talu og troystarrík orð til bønarhald og jarðarferð. Takk Sverri Steinhólm, sum vitjaði á sjúkrahúsinum. Somuleiðis takka vit sangarum og øllum, sum komu inn á gólvið og vóru um okkum. Takk øll tit, sum hjálptu so væl við ervinum og øðrum uppgávum til jarðarferðina. Takk fyri peningagávur til dóttrina, kransar og blómur, og takk øll tit, sum fylgdu Bjørn á hansara seinastu ferð her á fold. Hjartans takk øll somul og Harrans signing, við heilsan úr Johs. 3.16.

*Familjunnar vegna*
**Sólgerð, Bjarni, Jóhanna, Lissi, Turid, Tove og lítla Bianca Rose**



## TØKK

Hjartans tøkk til tykkum mongu, sum á ymiskan hátt hava verið um okkum,og við kærleika stuðlað, hjálpt og sýnt samkenslu, tá okkara høgt elskaða dóttir og systir:

**Sandra Mai Leivsdóttir Andreassen**

so brátt andaðist 14. januar 2010. Tøkk til starvsfólkið á L.S. fyri umsorgan. Tøkk til prestarnar Hanus á Gørðum og Una Næs fyri góð og troystarrík orð. Tøkk fyri alla hjálpina í sambandi við jarðarferðina og ervið. Tøkk til Rakul Petersen fyri vakran sang. Tøkk fyri allar heilsanir, blómur og kransar. At enda, eina hjartans tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu lítlu Sandru Mai á hennara síðstu ferð her á fold.

Má Harrin signa tykkum øll

**Jóhanna, Leivur og Tove**

*"Kærleikin er okkara lívs største gleði og okkara lívs største sorg - hann er lívið"*

## TØKK

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, hjálpsemi og umsorgan, tá okkara kæra mamma, vermamma og omma

**Herdis Mortensen**
**Argir**

doyði og varð jarðað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Hansa, Jacob Andrias, Magnhild og Jóhannis**






SU Føroyar

# Ein sannleiki og annar

Skal ein trúgva HUXA, hevur Javnaðarflokkurin fullkomið vald í ABC samgonguni. Sambært lesarabrævinum "Vistu tit, at...", eru tað javnaðarfólk, sum eru orsøkin til at t.d. studningurin til lesandi er skorin. Hetta tí at Javnaðarflokkurin hevur vágað sær at geva fólki ta løn, tey hava rætt til.

Somuleiðis hava myrku sosialistisku kreftirnar í Føroyum, eftir øllum at døma, samtykt ein internetskatt - tó at eingin tílíkur skattur í veruleikanum er til í Føroyum. Kringvarpsgjaldið, sum HUXA sipar til, er fyrst og fremst til orsakað av Fólkaflokkinum. Javnaðarflokkurin hevur leingi verið fyri, at kringvarpsgjaldið skal leggjast um til ein veruligan skatt, so at tað verður samhaldsfast og soleiðis ikki rakar t.d. lesandi.

Tað sama ger seg galdandi, tá tað kemur til flest allar ætlanir, sum veruliga vilja broyta samfelagið til tað betra. Um tú vil avtaka studningin til fiskivinnuna, sum avlagar alt føroyska vinnulívið, við at geva fiskivinnuni serstakliga óhepnar fyrimunir, so er tað Fólkaflokkurin, sum forðar fyri hesum. Vilt tú steðga við at geva reiðarum ókeypis fiskiloyvi, ið teir enntá kunnu selja øðrum við stórum vinningi? Fólkaflokkurin er ímóti tí. Skattareform, so at skipanin er meira rættvís? Veruligan grønan politikk? Kommunureform? Skúlareform? Fólkaflokkurin er ímóti tí.

Einum hevur HUXA tó rætt í. Politikkurin hjá ABC samgonguni hevur ikki verið tann besti vit hava sæð. Javnaðarflokkurin kann og skal gera meira fyri at broyta støðuna. Fólkaflokkurin hvørki kann ella vil.